# BØNARLØTAN

**OKTOBER** **2021** **36. árg.**

## *1. Fríggjadagur* *Áp. 8.1-17*



*Regin doypir Adrian*




### ITALIA, Sant'Elia
### Heidi og Regin Guttesen
### Megan 16, Trisha 9, Emma 5

Biðið fyri heilsuni hjá Heidi. Hon fekk tað nakað betur, tá hon fyri tveimum árum síðan varð skurðviðgjørd; men síðstu mánaðirnar eru symptomini komin aftur. 5. sept. vórðu Loveness úr Zimbabwe og Adrian úr Italia doypt. Sí video her: https://www.youtube.com/watch?v=GbOeVkF1sjY

## KRINGVARPIÐ

| | |
|---|---|
| 3. okt. | kl. 17 útvarpsmøti, Zarepta 18 ár |
| 3. okt. | sjónvarpsandakt, Jógvan Zachariassen |
| 10. okt. | kl. 16 sjónvarpsmøti úr Betel, Vági |
| 31. okt. | kl. 16 sjónvarpsmøti úr Hebron, Leirvík |
| 31. okt. | sjónvarpsandakt, Júst í Túni Vang |

## EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## ZAREPTA

Heystlega fyri tey, sum í árinum fylla 15, 16 ella 17 ár, verður 8. - 13. okt. Legan fyri 14 ár verður 14. - 17. okt.

## USA, Nebraska, Ethnos 360
## Rachel og Peter Hansen

1. - 2. okt. skal eg á nevndarfund hjá flogdeildini hjá NTM. 6. - 8. okt. eru vit bæði á trúboðaraskúlanum hjá NTM í USA at vegleiða næmingar, nú teir søkja Harran um, hvar teir skulu fara í tænastu. Okkum tørvar vísdóm í tænastuni.

***2. Leygardagur*** — ***Áp. 8.18-40***

## SENEGAL, Dakar, NTM
## Marion og Hans Arni Jensen
## Ryan 12

4. - 15. okt. hava vit skeið fyri okkara trúboðarum um mál og mentan. Teir koma úr sjey ymiskum londum. Vit verða um 100 fólk tilsamans. Biðið, at skeiðið eydnast, og at mong verða eggjað til tænastu.



**DANMARK, Kristnastova**
**Dora og Niels Pauli Nónstein**
**Sigrid 14, Andreas 12, Kristina 10**
Kristnastovulegan verður 21. - 24. okt. á Nordsjællands Efterskole. Vit fara øll niður á leguna. Dora verður í køkinum, og Niels Pauli hevur bíbliutímarnar.



**Sólva og Jákup Hansen**
Vit gleðast um, at Kristnastova í ár kann hava samkomulegu í heystfrítíðini 21. - 24. okt. Biðið, at Harrin signar Orðið og samfelagið.

**Susan og Øssur Berghamar**
Vit vóru fegin um at vera aftur í Føroyum í aug. Vit náddu tíverri ikki at vitja uttan fyri Havnina so ofta. Samfelagið her er latið uppaftur. Møtini fara fram sum vanligt, og vit kunnu aftur hava innandura andaktir á Sjúklingahotellinum.

**FØROYAR**
**Vanja og Svein í Prestgarði**
**Jenny 14, Svend 13, Terji 9, Petra 7**
Fleiri tóku ímóti Jesusi í Suðurgrønlandi í aug. umborð á Juvel II. Á vitjanini í Fosnavåg broytti Gud menniskju. Eg verði í Danmark og umborð á Ruth fyrst í okt. Konsert við Alex Bærendsen sangum og frásøgn verður í Lívdini seinnu hálvu av okt. Dina Jensdóttir Norðberg skal hava tiltøk fyri ung í Hvalba. Bønarhúsbólkar eru byrjaðir í Hvalba. Sóttarløtan verður send regluliga í vetur.
⋆ Í dag fylllir Nana Mortensen 10 ár

## *4. Mánadagur* *Ester 7.1-10*



**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Qaamaneq varð aftur loksins tikin upp í Aasiaat í ár. Biðið, at vit ikki aftur í ár fáa trupulleikar av, at innbúgv og olja verður stolið. Vit takka Gudi fyri, at gjaldið fyri at goyma bátin um veturin kann rindast trygt mánaðarliga. Vit verða í USA 4. okt. - 26. des. við fullari skrá. Biðið, at vit eisini fáa hvílu og verða andaliga uppbygd.

**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelen, Josva 12, Ester 11, Samuel 7**

## *5. Týsdagur* *Áp. 9.1-22*



**GRØNLAND, Nuuk**
**Hans Sivertsen**
**Ane og Filip Sivertsen, Kristian 16**
**Anne-Sophie og Óli Tindalíð, Liljan 16, Leanne 15, Luckas 2**

Í løtuni er nógv koronusmitta í Nuuk millum børn á stovni og ung í fólka- og miðnámsskúla. Vegna tilmæli noyðast vit at avlýsa barna- og ungdómsmøtini eina tíð. Nýggi salurin verður nú teknaður.

## *6. Mikudagur* *Áp. 9.23-43*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Vit endurskoða Ápostlasøguna. Eg skal halda fyrilestur á netinum á ráðstevnu um bíbliuumseting. Eg gleðist um forbøn.

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 8, Micah 8**

Í okt. kunnu vit hava fyrstu vikuskiftislegu við samkomuni í tvey ár. Hóast merkt av avmarkingum, eru vit sera takksom. Biðið, at hetta verður til uppbygging og styrk fyri samkomuna. Tað var ein sonn gleði at hava Róland og Elsu í Skorini á vitjan í samkomuni í sept.

## *7. Hósdagur* *Orðt. 27.1-27*



**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi**
**Carol og Poul Joensen**

Takkið fyri varðveitslu á ferðini til PNG. Fyrstu dagarnar var eg í sóttarhaldi; eg verði í Sorimi til 27. okt. Eg vitji samkomuna, havi bíbliulæru og arbeiði við ymiskum umsetingum. Biðið, at eg kann verða teimum trúgvandi til uppbygging.




**SUÐURAFRIKA, OM**
**Mamelodi Aids Hope**
**Tanja Mortensen**

⋆ Í dag fyllir Jónatan Tuohy 12 ár

## *8. Fríggjadagur* *Ester 8.1-17*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 13**
STEVN heldur fram við nærum 60 luttakarum. Vit hava ætlanir um fleiri líknandi tiltøk. At gera lærisveinar hevur stóran týdning, men krevur orku og tíð. Biðið fyri heilsu okkara.

## *9. Leygardagur* *Ester 9.1-19*



**DANMARK, Skovlunde, OM**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 15, Lydia 4**
Fleiri av vinum okkara úr Iran hava mist familjulimir í Iran av koronu og standa eftir her í Danmark við stórari sorg. Biðið, at vit sum samkoma vísa teimum umsorgan, og at tey venda sær til Jesus at fáa troyst og endamál í lívinum.

## *10. Sunnudagur* *Ester 9.20-10.3*



**OM, LOGOS HOPE**
Logos Hope vitjar nú í Karibiahavi, áðrenn leiðin liggur til Afrika. Til 13. okt. er Logos Hope í Freeport í Bahamaoyggjum, 19.-28. okt. í Vieux Fort, Saint Lucia og síðan í Sierra Leone. Sámal Rasmussen kom heim 14. sept, Noomi Eysturtún er umborð enn.

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 10, Tabita 7, Debora 6, Natan 3**

## *11. Mánadagur* *Áp. 10.1-24*



**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**
Bíbliuskúli er í Vejle hvønn hósdag og møti í Fredericia og Rødøvre annanhvønn sunnudag. Heyststevnan í ár verður í Vejle. Vit høvdu dóp í sept. Fyrst í okt. verða eisini tríggjar kvinnur doyptar.

## *12. Týsdagur* *Áp. 10.25-48*



**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 15, Rebekah 13, Lydia 11**
Claire venur nýggjar trúboðarar og hjálpir teimum at fáa samband við stuðlar. Craig hevur luttikið á online ráðstevnu fyri fólk, sum arbeiða við muslimum í Bretlandi, og hevur fingið samband við onnur, ið ynskja at náa kurdar.

## *13. Mikudagur* *Áp. 11.1-30*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**
Legan við Familjusentrinum fyrst í sept. gjørdist hin einasta í ár vegna koronu. Hon eydnaðist serliga væl. Biðið um Harrans leiðslu viðv. tænastuni, sum vit byrja vetrarhálvuna.

**GRØNLAND, Juvel II**
**Anna og Óli Steinberg**

## *14. Hósdagur* *Orðt. 28.1-28*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Vit eru takksom, at vit enn kunnu hava møtir sunnudagar, hóast myndugleikarnir krevja, at vit hava munnbind og halda frástøðu. John talar nú um hjúnabandið. Vit halda á at stroyma.



**USA, Alabama, NTM**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *15. Fríggjadagur* *Hásong. 1.1-17*



**ONGLAND, Taunton**
**Dorit og Simon Marshall**

ECM trúboðarar í Eysturríki hittast til møtir og bøn 15.-17. okt. Í hesum sambandi fara vit til Eysturríki at vitja. Simon skal tala á møtunum. Vit gleða okkum at koma til Føroya 21. okt.-22. nov. og vóna at vitja nakrar samkomur.



**ÍRLAND**
**Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## *16. Leygardagur* *Hásong. 2.1-17*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 4, Timon 2**

Tveir eldri menn, vit kendu, doyðu herfyri. Tann eini búði nærhendis, so vit fóru til jarðarferðina og fingu høvi at tosa við fólk. Hesin maðurin hevði hoyrt um Kristus. Vit læra framhaldandi kovol málið.

## *17. Sunnudagur* *Áp. 12.1-25*



**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**

Møti verða í Hólmahúsinum á Eiði leygarkvøldið og sunnudagin 23.-24. okt. Ætlanin er at hava barnamøti somu dagar.

**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**

## *18. Mánadagur* *Áp. 13.1-25*



**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 17, Victoria 15,**
**Emma Grace 13, Jónatan 12,**
**Markus 9, Evita 6, Joy 4**

Biðið fyri Pedro og familju hansara. Beiggi hansara varð dripin herfyri. Síðani er familjan vorðin áhugað at hoyra og læra meira úr Bíbliuni. Pedro stríðist sjálvur við rúsevnis-misnýtslu.

## *19. Týsdagur* *Áp. 13.26-52*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Takk fyri allar forbønir fyri Turkalandi, tær gera stóran mun. Á bíbliubrævskeiðnum síggja vit javnan, at fólk ynskja at fáa eitt Nýggja Testamenti.

★ Í dag fyllir Ester Mikkelsen 11 ár

## *20. Mikudagur* *Hásong. 3.1-11*



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 13, Noah 12, Karis 8,**
**Judah 6, Ethan 4**

Vit eru aftur inni í ættarbólkinum. Biðið, at vit kunnu undirvísa í Lele. Biðið um regn. Smáu áir okkara eru uppturkaðar, og vit noyðast at vaska klæði í áum hálvan tíma burturi. Skúlabøkurnar, sum vit hava bíðað eftir í fimm mánaðir, eru komnar. Biðið, at vit finna javnvág millum familjulív, skúla og tænastu.



**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 14**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Maria og Jens Bech**

★ Í dag fyllir Debora Christiansen 6 ár
★ Í dag fyllir Abigail Mortensen 3 ár

## *21. Hósdagur* *Orðt. 29.1-27*



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 11, Leah Ève 7, Abigail 3**

Døtur okkara ganga í 3. og 6. flokki. Cécile arbeiðir við ungdómsbólkinum. Biðið um andaligan vøkstur, og at tey ungu taka við meiri ábyrgd. Eg var so slakkur í vár, og læknin hevur nú biðið meg taka tað róligari. Mær tørvar vísdóm at finna javnvág millum familju, samkomuarbeiði og arbeiðið. Vit arbeiða við at stovna nýggja samkomu, tí samkoman veksur skjótt. Okkum tørvar vísdóm og einleika.

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

## *22. Fríggjadagur* *Hásong 4.1-16*



**TÝSKLAND, Hückeswagen,**
**Ethnos 360 (fyrrv. NTM)**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 9**

Biðið um vísdóm at javnviga tær ymisku ábyrgdirnar, Gud hevur givið okkum her í Týsklandi.

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**



⋆ Í dag fyllir Sarah Mortensen 11 ár

## *23. Leygardagur* *Hásong. 5.1-16*



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Vit eru takksom fyri góða heilsu, alt meðan fleiri dragast við Covid-19. Vit skriva framvegis sangir og skriva bíbliutekstir til sangtekstir. Enn eru bara lív Ábrahams og Ísaks útgivið á Saafi-málinum. Biðið um vísdómi fyri bíbliulærarunum. Vit eru takksom fyri stuðul og bøn fyri verki Guds í Senegal.

## *24. Sunnudagur* *Áp. 14.1-28*



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 5, Jude 3, Evelyn 1**

Vit eru takksom, at Brian er komin fyri seg eftir skurðviðgerðina. Biðið, at vit kunnu fara til Papua Nýguinea í jan. Lili er byrjað at undirvísa okkara elsta barni, Elliot. Biðið um høvi at lívga fráfarnar Ethnos 360 trúboðarar her í Florida, tí vit tæna teimum hvønn dag.

⋆ Í dag fyllir Natan Christiansen 3 ár

## *25. Mánadagur* *Áp. 15.1-21*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Eg haldi á at rættlesa ymiskt, sum ungi bygdarmaðurin hevur umsett úr Gamla Testamenti. Vónandi fái eg meiri tíð hendan mánaðin at arbeiða við tí, eg sjálv havi umsett. Vit halda á at hava bíbliutímar eina ferð um vikuna. Nakað av fólki kemur.

## *26. Týsdagur* *Áp. 15.22-41*



**FILIPSOYGGJAR, Naplud, NTM**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 17, Rebekka 16, Hanna 13**
Vit hava nú verið í Føroyum í tveir mánaðir. Ætlanin er at vera heima í minst eitt ár hesaferð, serliga tí at døturnar Ragnhild og Rebekka nú eru 17 og 16 ára gamlar, og vit ynskja, at tær skulu kunna klára seg sjálvar her heima. Allar tríggjar trívast væl: Ragnhild gongur annað árið á miðnámi, Rebekka gongur á eftirskúlanum Brúgvin í Skálavík, og Hanna gongur í sjeynda flokki í Klaksvík. Tað er heilt serligt at kenna frælsið her heima í mun til drúgvu sóttarhaldini á Filipsoyggjum.



**ONGLAND, North Cotes, NTM**
**Julie og Sonni Poulsen**

## *27. Mikudagur* *Hásong. 6.1-13*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**
Vit byrja kyknubólkar í trimum heimum henda veturin. Vit møtast til eina máltíð og um Orðið. Biðið, at vit kunnu styrkja um felagsskapin í kyknubólkunum.

## *28. Hósdagur* *Orðt. 30.1-33*



**FILIPSOYGGJAR, Manila, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**
Nú trúboðarar eru koppsettir, ber aftur til hjá teimum at vitja samkomur. Vit sleppa kortini enn ikki aftur til Filipsoyggjar, tí landið er framvegis stongt fyri útlendingum. Vit hava vónir um, at støðan broytist eftir nýggjár. Eg haldi á at umseta Tessalonikabrøvini.

## *29. Fríggjadagur* *Hásong. 7.1-13*



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 16, Aron 9, Noah Kristian 7**
Biðið fyri skúlagongdini hjá børnum okkara í hesi Covid-19 tíð.

**Útgevari** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd** Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla** Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
**Uppseting** Palli Skorheim, tel. 290087



## JAPAN, OM
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 12, Nana 10, Louie 7, Rio 2**

Nú er aftur undantaksstøða í Kanagawa. Hetta fær serliga avleiðingar fyri møtini. Vit mugu biðja fólk ikki at koma. Vit hava fleiri eldri, sum ikki duga so væl við nýggjari tøkni, so tað er ein avbjóðing fyri okkum øll.

## VENESUELA, Puerto Ordaz, NTM
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**




## ÍSLAND, Akureyri
**Kristín Gerðalíð**



**Myndasavn** pallis76@yahoo.dk
**Prent** Føroyaprent, tel. 314555
**Teldupostur** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða** www.kbs.fo

©KBS. *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

## NÝGGJ BÓK

**196 síður 198 kr.**




Max Lucado viðger 12 av lyftum Guds í Bíbliuni. Hann eggjar okkum til ikki at lata trupulleikar og umstøður, vit møta í lívinum, taka okkum av fótum, men heldur at líta á lyfti Guds og orð hansara. Lyfti Guds halda, tá alt rundan um okkum tykist ótrygt og svikaligt. Lít á Harran, og lat hann leiða teg.

Jákup Nolsøesgøta 17, Tórshavn
Opið mán.-frí. kl. 14:00-17:30
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo

BÓKASØLAN logos